ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

9. juni 2021
Mál: 21/10130-2
Tygara Skriv:
Viðgjørt: EMH

Nr. 52-156/2020

Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Stýrið fyri Bústaðir

Spurningar:

Fyriliggur nakað frámæli frá umsitingini/aðalstjóranum í Almannamálaráðnum viðvíkjandi valinum av stýrinum í Bústøðum?

Viðmerkingar:
Landsstýrismaðurin hevur svarað løgtingsfólkum, at hon ætlar ikki at upplýsa fyri løgtingsfólkum um innanhýsis skjøl hjá fyrisitingini viðvíkjandi valinum av nýggjum stýri fyri Bústaðir.
Uppgávan hjá tingfólkum er m.a. at hava eftirlit við, hvussu landsstýrisfólk umsita málsøki síni. Tí eiga tingfólk at fáa at vita, um tað liggur frámæli frá umsitingini/aðalstjóranum í Almannamálaráðnum í málinum um val av einum ella fleiri limum í nýggja stýrinum fyri Bústaðir.

Á Løgtingi, 28. mai 2021

Beinta Løwe Jacobsen

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

Svar:
§ 2 í løgtingslóg um Húsalánsgrunn áleggur landsstýrismanninum at velja stýrið, og tað hevur landsstýrismaðurin gjørt. Eg havi tikið avgerð og valt stýrið, og meti, at fólkini eru væl kvalifiserað og hava eina breiða og umboðandi vitan. Samanlagt hava limirnir í stýrinum gott innlit í bygging, búskaparfrøði og fígging og gott innlit í sosiala øki. Eisini eru tveir av limunum endurvaldir til tess at tryggja framhald.

Eins og upplýst fyri spyrjara í svari uppá fyrispurning nr. 52-145/2020 eftir § 52a í Tingskipanini, er tað landsstýrismaðurin, sum tilnevnir stýrið fyri Húsalánsgrunnin, og hevur landsstýrismaðurin heldur ikki hesuferð ætlanir um at upplýsa fyri spyrjara um innanhýsis skjøl hjá fyrisitingini, sum heldur ikki alment innlit er latið í.

9. juni 2021

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður